# Josef gekk undan

**HONDBÓLTUR**

**Josef Abrahamsen hevur fingið nýggjan leiklut, síðan Henrik Gerster setti seg í venjarasessin hjá Kyndil. Í gjár gekk Abrahamsen undan í sigrinum móti StÍF**



*Josef Abrahamsen tykist stórtrívast í nýggja leiklutinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Josef Abrahamsen hevur verið eyðsýndur higartil.

Á plássinum sum spælskipari hevur hann verið snúningsdepilin í álopsspælinum hjá Kyndli higartil.

Hann er skjótur og ágrýtin, og ræðist ikki at bjóða verjuleikarunum av. Og tað er ofta, at hann smoyggir seg inn um og sendir framvið málverjanum.

Josef Abrahamsen var dagsins maður hjá Kyndli í gjár. Við sínum sjey málum átti hann høvuðsleiklutin, tá grønlittu havnarmenninir bastu StÍF. Hann royndi støðugt at hótta gestirnar við sínum ágangandi og hugflogsríka álopsspæli.

Hann hevur altíð spælt sum vongur á besta mansliðnum. Nú hevur Henrik Gerster, venjari, givið honum meira týðandi uppgávu, og hann ber tað væl.

### Í seinastu løtu

Josef Abrahamsen og hinir runnu aftaná so at siga allatíðina, tá StÍF vitjaði í høllini á Hálsi í gjár.

Heimaliðið vann sær ikki leiðsluna, fyrr enn átta minuttir restaðu í av dystinum. Leivur Justinussen og Marius Joensen vóru væl upplagdir, hóast heimaliðið vardi væl.

Gerster valdi at mansverja Marius Joensen, og tað tók broddin av álopsspælinum hjá gestunum.

Dysturin var stundum rótutur. Bæði liðini gjørdu ofta ov skjótt av á hálvuni hjá mótstøðulinum, sum hevði fleiri púra óneyðug mistøk við sær.

Heimaliðið dugdi betri at gera sær dælt av mistøkunum, og seinastu løtuna var Kyndil á odda við trimum málum. StÍF hótti ongantíð leiðsluna.

Málverjarnir, Magnus Matras, Kyndil, og Marian Cirloganescu, StÍF, áttu eisini týðandi leiklut, at ikki fleiri enn 38 mál vóru skotin.

### Standa sína roynd

Kyndil legði sera illa frá landi í hesum kappingarárinum, tá KÍF hølvaði havnarmenninar av í høllini á Hálsi í fyrsta umfarinum.

Kyndil hevur nú vunnið á VÍF og StÍF. Komandi vikurnar fara helst at geva ábendingar um, hvar ymsu liðini fara at stríðast á stigatalvuni í hesum kappingarárinum.

Henrik Gerster ræðist ikki at flyta spælararnar, og seinastu sjey dagarnir hevur tað riggað væl.

Spurningurin er so, um tað er nóg mikið, at Kyndil fer at kappast við ovastu liðini.

*uni@sosialurin.fo*

## Kyndil - KÍF 21-18 (9-11)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**5 min.: 1-3**
**10 min.: 4-4**
**15 min.: 6-6**
**20 min.: 6-8**
**25 min.: 8-8**
**35 min.: 12-12**
**40 min.: 14-14**
**45 min.: 15-15**
**50 min.: 17-17**
**55 min.: 19-17**

**Kyndil:** Josef Abrahamsen 7, Hans Áki Dal-Christiansen 4, Rani Ellingsgaard 3, Andrias B. Sólsker 2, Julian Jónsson Johansen 2, Hans Arni Thomsen 1, Torvald Abrahamsen 1, Rúni Johansen 1.
Útvísingar: 6
Venjari: Henrik Gerster
**StÍF:** Leivur Justinussen 8, Marius Joensen 6, Jóanes Prestá 2, Jógvan Berg 1, Jógvan G. Joensen 1.
Útvísingar: 5
Venjari: Alexandur Johansen
Áskoðarar: 220

## Bárður er við aftur

Bárður Johannesen hevur ikki spælt við fyrstu landskappingardystirnar, tí hann hevur verið burturstaddur.

Nú er stríðsmaðurin hjá Kyndli tøkur aftur, og hann royndist eisini væl í verjupartinum móti StÍF í gjár.

Hann er framvegis ikki í fullari venjing, men sum heimasíðan hjá Kyndli skrivar, so verður hann meira upplagdur, tá hann hevur vant og spælt nakrar dystir afturat.

# Team Klaksvík tapti aftur stórt

**HONDBÓLTUR Team Klaksvík hevur einki stig fingið fyri fyrstu tríggjar landskappingardystirnar. Fríggjakvøldið vann VÍF við níggjum málum í Klaksvík**

Uni Holm Johannesen

Klaksvíkingar gjørdu greitt undan kappingarbyrjan, at teir fóru helst ikki at bjóða hinum liðunum stórvegis av í hesum kappingarárinum. Og tað hava klaksvíkingar heldur ikki higartil.

Fríggjakvøldið tapti Team Klaksvík triðja dystin upp í slag. VÍF vann 27-18 í Klaksvík.

Heimaliðið spældi við fyrstu løtuna, men so settu vestmenningarnir ferðina upp.

Team Klaksvík tapti í fyrsta umfarinum fyri Neistanum við 17 málum. Farna vikuskiftið taptu klaksvíkingar við 11 málum fyri KÍF. Nú taptu klaksvíkingar við níggju málum fyri VÍF.

*uni@sosialurin.fo*

## Team Klaksvík - VÍF 18-27

Dómarar: Kári Hansen og Sámal Paulason

**Team Klaksvík:** Damir Oros 5, Jón Jacobsen 4, Zarko Petjovic 3, Jógvan Hansen 3, Dánjal Kjærbo 2, Steffan Kalsø 1.
Venjari: Pole J. Hansen
**VÍF:** Jóan Pauli Høgnesen 5, Sámal Jákup Djurhuus 5, Áki G. Olsen 4, Jákup Andreas Joensen 3, Jákup Suni Andreasen 3, Magnus Muller 2, Bjarti Hansen 2, Niels Andreasen 1 og Sjúrður Nielsen 1.



## Atlantic Airways deildin menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍF | 3 | 3 | 0 | 0 | 112 | 80 | 32 | 6 |
| 2 | Neistin | 2 | 2 | 0 | 0 | 80 | 54 | 26 | 4 |
| 3 | Kyndil | 3 | 2 | 0 | 1 | 79 | 87 | -8 | 4 |
| 4 | VÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 76 | 72 | 4 | 2 |
| 5 | StÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 41 | 42 | -1 | 2 |
| 6 | H71 | 2 | 0 | 0 | 2 | 47 | 63 | -16 | 0 |
| 7 | Team Klaksvík | 3 | 0 | 0 | 3 | 78 | 115 | -37 | 0 |

**Sunnudagin, 17. oktober:**
StÍF – Team Klaksvík
VÍF – H71
KÍF – Neistin

**Mikudagin, 20. oktober:**
H71 – StÍF
Team Klaksvík – Kyndil